

– Sjálvandi er tað altíð hugaligt at fáa spælitíð, men tá tað skal vera undir slíkum umstøðum, so verður gleðin nakað væl minni, segði Rasmus Magnusson, sum tó fegnaðist um úrslitið av fyrru hálvfinaluni

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tveittur í eldin

**Rasmus Magnusson hevur vanliga havt leiklutin sum eykamaður fyri Marian Cirloganescu, men tá hesin varð skaddur mikukvøldið, fekk maðurin við 12-talinum eina óvanliga sentrala støðu**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað var ein skakandi hending fyri flest øll í høllini, tá Marian Cirloganescu brádliga small í gólvið mikukvøldið. Við stórari pínu varð málverjin borin av vøllinum, og einki er at ivast í, at flestu StÍF leikararnir eina løtu mistu sambandið við ígongdverandi dystin, og heldur hugsaðu um støðuna hjá málverjanum.

Dysturin helt tó fram, og hjá Rasmus Magnussyni vóru stundirnar at hugsa um liðfelagan og lærumeistaran ikki serliga góðar. Hann varð tveittur beint fyri leyvurnar í egnari holu, og saman við liðfeløgunum megnaði hann eisini at stríða seg fram til ein sigur.

Beint eftir dystin fingu vit orðið á málverjan, og hann ásannaði alt fyri eitt, at hetta var ein sera trupul støða at koma inn í.

– Sjálvandi er tað altíð hugaligt at fáa spælitíð, men tá tað skal vera undir slíkum umstøðum, so verður gleðin nakað væl minni. Og havandi støðuna hjá Marian í huga, so var tað fyrstu løtuna serstakliga trupult at savna tankarnar um dystin, helt hann fyri.

Men sum úrslitið sigur, so gekk tað kortini, og tað kann eisini leggjast afturat, at parturin hjá Rasmusi so avgjørt ikki lá eftir í so máta. Fleiri ferðir togaði hann avgerandi bjargingar fram, og hann nikkaði bara játtandi, tá vit spurdu, hvørt tað ikki stóð nógv á hesar 40 minuttirnar.

– Jú. Har leikarði sera hart á, og spenningurin helt sær allan dystin á tamb. Men vit hava ofta staðið okkum framúr væl í steypakappingini, og málið hesa ferð er so avgjørt eisini at koma í finaluna – og vinna hana. Men at tað verður trupult, ivist eg ikki í. Fyrst og fremst er sjálvandi returdysturin móti VÍF, og um so er, at vit klára tað, so bíðar Kyndil helst í finaluni, segði málverjin at enda, tó at smíli vaks nakað, tá vit kundu siga honum frá, hvussu støðan hevði verið í Høllini á Hálsi.

Men sum málverjin sjálvur sigur, so má mótstøðuliðið í finaluni bíðað, líkamikið, hvønn talan er um. Fyrst og fremst ræður um at verja tepru leiðsluna, sum StÍF vann sær mikukvøldið, og skal hetta eydnast, so er tað sannlíkt, at Rasmus Magnusson enn einaferð fær ein stóran leiklut í hesum.

# Svimjistevna á Toftum

**Árliga Flot stevnan var um vikuskiftið á Toftum.**

SVIMJING
*tíðindaskriv*



*Átta svimjifeløg tóku lut á stóru svimjistevnuni, sum Flot á Toftum skipaði fyri um vikuskiftið*

Lagt varð fyri fríggjakvøldið við bólki 1, sum eru svimjarar í árganginum 95 og yngri. Stóri vinnarin í bólki 1 gjørdist Fuglafjarðar Svimjifelag, sum vann 6 gull og átti Poula Ø. Mohr 5 av teimum. Skeggjar gjørdist nummar tvey við 3 gull og var tað Tróndur J. á Høvdanum, ið vann tey øll. Ikki vóru tað bert tey bæði, Poula og Tróndur, ið gjørdu um seg í bólki 1, Alvi Mikkelsen úr Ægir vann kappingina í ryggsvimjing og Turid Christiansen úr Reka vann silvur í trimum kappingum.

Leygarmorgunin varð so hildið fram, nú átti bólkur 2 tørn. Svimjarar í árganginum 93 og 94 umboðaðu bólki 2 og lá Havnar Svimjifelag til at vinna flest allar kappingarnar. Hildur á Fløtti, Sasho Bjartason og Dagmar M. Winther vunnu felagnum 5 flott fyrsta pláss. Hóast flottan sigur til Havnar Svimjifelag, var tað ikki uttan harða mótstøðu frá m.a. Arni Gregersen úr Skeggjum, Pól Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, Elisabeth Bærentsen úr Tvøroyrar Svimjifelag og Heðin Olsen úr Reka, at gullið varð hongt um hálsin hjá teimum trimum.



*Hesir tríggir tykjast teljast millum teirra, sum nógv verður roknað av framyvir. Arnhold Davidsen, Pauli Mohr og Jóhan Símun Edmundsson tóku sær av heiðursmerkjunum á 50 metrum í bæði bringu og firvaldi*

Seinnapartin leygardagin varð tað bólkur 3, ið slapp fram at. Hesi eru í árganginum 91 og 92. Hjá gentum var Elspa Mørkøre frá Skeggjum einaráðandi og vann allar 4 einstøku kappingarnar, ímeðan Arnold Davidsen úr Flot og Pauli Ø. Mohr úr FS vunnu tvær kappingar í hvør. Aðrir svimjarar, sum lógu fram við og eisini komu uppá medaljustabban, vóru m.a. Bjørg Seloy, Petur Mcintosh og Fríða við Streym úr Havnar Svimjifelag, Sissal Petersen úr Vágs Svimjifelag, Mona Simonsen úr Tvøroyrar Svimjifelag og Joan Símun Edmundsson úr Flot.

Tá teljast skuldi upp, hvør hevði vunnið kappingina samanlagt, sást beinanvegin, at grannabygdirnar Gøta og Fuglafjørður vóru sera tættar, men vórðu tað Skeggjar, ið drógu longra stráið við einum gullheiðursmerki.

Úrslitið av kappingini gjørdist sostatt:

Úrslitini í einstøku kappingunum framganga av yvirlitinum, sum sæst her á síðunum.

| | | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Skeggjar | 10 | 1 | 0 |
| 2 | FS | 9 | 5 | 3 |
| 3 | HS | 5 | 9 | 7 |
| 4 | Flot | 4 | 5 | 9 |
| 5 | Reki | 3 | 4 | 2 |
| 6 | TS | 1 | 5 | 3 |
| 7 | Ægir | 1 | 3 | 1 |
| 8 | VS | 0 | 1 | 4 |



*Eftir kappingina boðaði landsliðsvenjarin frá, hvørjar svimjarar hann hevur valt at taka út til talentliðið, sum er tað fyrsta av sínum slag*

# Úrslit, Flotstevnan

| Nr. | Navn | ár Felag | Tíð |
|---|---|---|---|
| **Kapping: 150 metur Firvald genur** | | **B1** | |
| 1 | Poula Ø. Mohr | 95 FS | 0.58.5 |
| 2 | Marta Thomsen | 95 FS | 1.04.9 |
| **Kapping:3 33 metur Rygg Gen** | | **B1** | |
| 1 | Poula Ø. Mohr | 95 FS | 0.31.4 |
| 2 | Turid Christiansen | 96 Reki | 0.36.5 |
| 3 | Birita Debes | 95 FLOT | 0.38.4 |
| **Kapping:4 33 metur Rygg Dreingir** | | **B1** | |
| 1 | Alvi Mikkelsen | 96 Ægir | 0.36.5 |
| 2 | Tróndur J. á Høvdanum | 95 Skeggjar | 0.36.6 |
| 3 | Hakun Edmundson | 96 FLOT | 0.37.1 |
| **Kapping:5 33 metur Fri Gentur** | | **B1** | |
| 1 | Poula Ø. Mohr | 95 FS | 0.27.1 |
| 2 | Turid Christiansen | 96 Reki | 0.27.9 |
| 3 | Helena Lamhauge | 95 HS | 0.28.8 |
| 4 | Birita Debes | 95 FLOT | 0.29.5 |
| 5 | Gunnva G. Jacobsen | 95 HS | 0.30.7 |
| 6 | Marta Thomsen | 95 FS | 0.31.3 |
| 7 | Eva Petersen | 96 Skeggjar | 0.32.4 |
| 8 | Johanna Egholm | 96 FS | 0.32.4 |
| 9 | Jórun Hansen | 95 FLOT | 0.36.1 |
| 10 | Tóra Djurhuus | 96 Reki | 0.37.4 |
| 11 | Rita Vika | 96 Reki | 0.40.0 |
| **Kapping:6 33 metur Fri Dreingir** | | **B1** | |
| 1 | Tróndur J. á Høvdanum | 95 Skeggjar | 0.28.6 |
| 2 | Alvi Mikkelsen | 96 Ægir | 0.29.9 |
| 3 | Hakun Edmundson | 96 FLOT | 0.30.8 |
| **Kapping:7 16 metur Rygg Gentur** | | **B1** | |
| 1 | Poula Ø. Mohr | 95 FS | 0.14.5 |
| 2 | Birita Debes | 95 FLOT | 0.17.0 |
| 3 | Turid Christiansen | 96 Reki | 0.17.6 |
| **Kapping:8 16 metur Rygg Dreingir** | | **B1** | |
| 1 | Tróndur J. á Høvdanum | 95 Skeggjar | 0.15.7 |
| 2 | Hákun Edmundson | 96 FLOT | 0.17.0 |
| 3 | Alvi Mikkelsen | 96 Ægir | 0.17.9 |
| **Kapping:9 16 metur Fri Gentur** | | **B1** | |
| 1 | Poula Ø. Mohr | 95 FS | 0.11.9 |
| 2 | Turid Christiansen | 96 Reki | 0.12.0 |
| 3 | Helena Lamhauge | 95 HS | 0.13.7 |
| **Kapping:10 16 metur Fri Dreingir** | | **B1** | |
| 1 | Tróndur J. á Høvdanum | 95 Skeggjar | 0.13.0 |
| 2 | Alvi Mikkelsen | 96 Ægir | 0.13.2 |
| 3 | Hákun Edmundson | 96 FLOT | 0.13.4 |
| **Kapping:11 4x33 metur Fri Gentur** | | **B1** | |
| 1 | Reki | B1 Reki | 2.29.5 |
| | Turid Christiansen | | |
| | Tóra Djurhuus | | |
| | Rita Vika | | |
| | Óluva Jacobsen | | |
| 2 | Flot | B1 FLOT | 2.29.6 |
| | Bjørg Olsen | | |
| | Birita Debes | | |
| | Jórunn Hansen | | |
| | Margaret Lilaa | | |
| 3 | Fs1 | B1 FS | 2.45.0 |
| | Lív Hansen | | |
| | Marta Thomsen | | |
| | Johanna Egholm | | |
| | Marita Magnadottir | | |
| **Kapping:12 4x33 metur Fri Dreingir** | | **B1** | |
| 1 | Fs1 | B1 FS | 4.08.4 |
| | Fríðleif Joensen | | |
| | Baldur Djurhuus | | |
| | Benjamin Rouah | | |
| | Jákup O. á Lakjuni | | |
| **Kapping:13 33 metur Bringa Gentur** | | **B2** | |
| 1 | Dagmar M. Winther | 93 HS | 0.31.1 |
| 2 | Elisabeth Bærentsen | 93 TS | 0.31.8 |
| 3 | Helena Strom | 94 VS | 0.32.2 |
| **Kapping:14 33 metur Bringa Dreingir** | | **B2** | |
| 1 | Arni Gregersen | 93 Skeggjar | 0.33.1 |
| 2 | Sasho Bjartason | 93 HS | 0.34.7 |
| 3 | Heðin Olsen | 94 Reki | 0.35.7 |
| **Kapping:15 33 metur Rygg Gentur** | | **B2** | |
| 1 | Hildur á Fløtti | 93 HS | 0.28.6 |
| 2 | Elisabeth Bærentsen | 93 TS | 0.29.3 |
| 3 | Helena Strom | 94 VS | 0.29.8 |
| **Kapping:16 33 metur Rygg Dreingir** | | **B2** | |
| 1 | Pol Mohr | 94 FS | 0.30.6 |
| 2 | Kristian Martin Joensen | 93 Ægir | 0.33.4 |
| 3 | Hanus á Tjaldrafløtti | 93 HS | 0.33.4 |
| **Kapping:17 50 metur Firvald Gentur** | | **B2** | |
| 1 | Elisabeth Bærentsen | 93 TS | 0.49.7 |
| 2 | Helena Strøm | 94 VS | 0.50.6 |
| 3 | Astrid Foldarskarð | 94 FLOT | 0.51.7 |
| **Kapping:18 50 metur Firvald Dreingir** | | **B2** | |
| 1 | Sasho Bjartason | 93 HS | 0.51.4 |
| 2 | Heðin Olsen | 94 Reki | 1.04.6 |
| **Kapping:19 33 metur Fri Gentur** | | **B2** | |
| 1 | Hildur á Fløtti | 93 HS | 0.23.7 |
| 2 | Helena Jacobsen | 93 HS | 0.24.6 |
| **Kapping:20 33 metur Fri Dreingir** | | **B2** | |
| 1 | Heðin Olsen | 94 Reki | 0.24.0 |
| 2 | Pol Mohr | 94 FS | 0.24.9 |
| **Kapping:21 4x33 metur Fri Gentur** | | **B2** | |
| **1** | **Hs1** | **B2 HS** | **1.46.8** |
| | Helena Gunnarsdottir | | |
| | Dagmar M Winther | | |
| | Andrea Midjord | | |
| | Hildur A Fløtti | | |
| 2 | Fs | B2 FS | 1.54.5 |
| 3 | Vs1 | B2 VS | 1.58.1 |
| **Kapping:22 4x33 metur Fri Dreingir** | | **B2** | |
| 1 | Reki | B2 Reki | 1.51.8 |
| 2 | Hs1 | B2 HS | 1.53.5 |
| 3 | Hs2 | B2 HS | 2.00.0 |
| **Kapping:23 50 metur Firvald Gentur** | | **B3** | |
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 Skeggjar | 0.34.3 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 HS | 0.36.0 |
| 3 | Sissal Petersen | 91 VS | 0.37.1 |
| **Kapping:24 50 metur Firvald Dreingir** | | **B3** | |
| 1 | Arnhold Davidsen | 91 FLOT | 0.33.4 |
| 2 | Pauli Ø. Mohr | 91 FS | 0.33.5 |
| 3 | Petur Mcintosh | 91 HS | 0.34.4 |
| **Kapping:25 50 metur Rygg Gentur** | | **B3** | |
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 Skeggjar | 0.33.1 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 HS | 0.37.6 |
| 3 | Mona Simonsen | 91 TS | 0.37.8 |
| **Kapping:26 50 metur Rygg Dreingir** | | **B3** | |
| 1 | Pauli Ø. Mohr | 91 FS | 0.34.5 |
| 2 | Petur Mcintosh | 91 HS | 0.35.1 |
| 3 | Joan Símun Edmundson | 91 FLOT | 0.36.7 |
| **Kapping:27 4x33 metur Blandað GenturB3** | | | |
| 1 | Skeggjar | B3 Skeggjar | 1.42.1 |
| | Sóley Strømsten | | |
| | Hildigard Hansen | | |
| | Elspa Mørkøre | | |
| | Bjørg Jarnskor | | |
| 2 | Ts | B3 TS | 1.44.6 |
| | Kristina Hansen | | |
| | Malan Bærentsen | | |
| | Mona Simonsen | | |
| | Sólva Rúnadóttir | | |
| 3 | Hs1 | B3 HS | 1.45.7 |
| | Rakul Iansdóttir | | |
| | Frida við Streym | | |
| | Bjørg Seloy | | |
| | Katrina Lamhauge | | |
| **Kapping:28 4x33 metur Blandað DreingirB3** | | | |
| 1 | Flot1 | B3 FLOT | 1.31.4 |
| | Jógvan Elias Davidsen | | |
| | Arnhold Davidsen | | |
| | Joan Símun Edmundson | | |
| | Remi Langgaard | | |
| 2 | Flot2 | B3 FLOT | 2.06.8 |
| | Tróndur Olsen | | |
| | Uni Djurhuus | | |
| | Harald Símunarson Hansen | | |
| | Johan Petur Petersen | | |
| 3 | Flot3 | B3 FLOT | 2.14.6 |
| | Magnus Andreasen | | |
| | Rasmus Hansen | | |
| | Eli Frederiksberg | | |
| | Hans Jakup Andreasen | | |
| **Kapping:29 50 metur Fri Gentur** | | **B3** | |
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 Skeggjar | 0.29.5 |
| 2 | Bjørg Seloy | 92 HS | 0.32.5 |
| 3 | Mona Simonsen | 91 TS | 0.33.4 |
| **Kapping:30 50 metur Frí Dreingir** | | **B3** | |
| 1 | Pauli Ø. Mohr | 91 FS | 0.29.5 |
| 2 | Joan Símun Edmundson | 91 FLOT | 0.30.0 |
| 3 | Arnhold Davidsen | 91 FLOT | 0.30.3 |
| **Kapping:31 50 metur Bringa Gentur** | | **B3** | |
| 1 | Elspa Mørkøre | 91 Skeggjar | 0.38.1 |
| 2 | Malan Bærentsen | 91 TS | 0.41.9 |
| 3 | Fría við Streym | 91 HS | 0.43.0 |
| **Kapping:32 50 metur Bringa Dreingir** | | **B3** | |
| 1 | Arnhold Davidsen | 91 FLOT | 0.37.5 |
| 2 | Pauli Ø. Mohr | 91 FS | 0.38.6 |
| 3 | Joan Símun Edmundson | 91 FLOT | 0.40.3 |
| **Kapping:33 4x33 metur Fri Gentur** | | **B3** | |
| 1 | Skeggjar | B3 Skeggjar | 1.31.2 |
| | Hildigarð Hansen | | |
| | Bjørg Jarnskor | | |
| | Elspa Mørkøre | | |
| | Sóley Strømsten | | |
| 2 | Ts | B3 TS | 1.31.6 |
| | Malan Bærentsen | | |
| | Kristin Hansen | | |
| | Sólva Runadottir | | |
| | Mona Simonsen | | |
| 3 | Hs1 | B3 HS | 1.33.9 |
| | Bjørg Seloy | | |
| | Katrina Lamhauge | | |
| | Rakul Jansdóttir | | |
| | Frida við Streym | | |
| **Kapping:34 4x33 metur Fri Dreingir** | | **B3** | |
| 1 | Flot1 | B3 FLOT | 1.20.4 |
| | Joan Símun Edmundson | | |
| | Harald S. Hansen | | |
| | Remi Langgaard | | |
| | Arnhold Davidsen | | |
| 2 | Hs1 | B3 HS | 1.23.7 |
| | Peter Mcintoch | | |
| | Jákup Símun Jacobsen | | |
| | Pauli H. Nordfoss | | |
| | Høgni Mine Rasmussen | | |
| 3 | Fs | B3 FS | 1.37.7 |
| | Pauli Ø. Mohr | | |
| | Erik Klein | | |
| | Bárður Hansen | | |
| | Georges Rouah | | |

W W W . S O S I A L U R I N . F O